## EIN TRUPULLEIKI, SUM NÓGV FÓLK IKKI GEVA SÆR FAR UM

Í greinini “Tabermænd er den nye underklasse” í Politiken 24. oktober 2009 verður ljóskastarin settur á “taparamenninar”. Har verður víst á møguligar orsøkir, m.a. vantandi útbúgving.

Hvat verður ella átti at verið gjørt annað enn at tosa og skriva um hetta fyribrigdi?

Ein gongd leið er at hjálpa hesum dreingjum og monnum at fara undir og gera eina útbúgving lidna. Nevnast kann, at í fleiri av okkara gannalondum hava fakfeløgini ein virknan leiklut í tílíkum arbeiði.

Sum áður nevnt eru orsøkirnar, at skúlagongd hjá dreingjum og monnum ikki eydnast nóg væl nógvar. Um ein hyggur at hagtølum um trupulleikar í skúlaverkinum, eiga dreingirnir sín stóra part av hesum trupulleikum, og ein av hesum eru stórir lesi- og skrivitrupulleikar ofta nevndir dysleksi.

Við íblástri úr okkara grannalondum komi eg tí við hesum tilmælum:

- Vit eiga at finna trupulleikarnar tíðliga og byrja at hjálpa beinan vegin. Skjót hjálp er góð hjálp
- Vit eiga at eggja fólki, ið hava torført við at lesa og skriva, at fara undir útbúgving ella eftirútbúgving
- Vit eiga at stuðla børnum málsliga og vísa foreldrum í verki, hvussu tey best kunna vera við í hesum arbeiði
- Vit eiga at hava eina heilskapaða útbúgvingarverkætlan fyri ung við dysleksi
- Vit eiga at bøta um dygdina í serundirvísingini av fólki við dysleksi
- Vit eiga at bera so í bandi, at ung við dysleksi beinanvegin fáa møguleikan at lesa og skriva so nógv sum gjørligt við KT ryggsekkinum sum hjálpiamboð
- Vit eiga at geva lærarum, sum skulu undirvísa fólki við dysleksi eina grundútbúgving, so tey eru før fyri at arbeiða við hesum serliga trupulleika
- Vit eiga at kanna, á hvønn hátt vit kunnu hjálpa ungum og vaksnum við dysleksi upp á eitt hægri støði, so tey hava ein veruligan møguleika at taka eina útbúgving
- Vit eiga at hyggja at, hvør skipan og hvat slag av útbúgvingum og skeiðum høvdu gjørt lærararnar førar fyri á bestan hátt at gjørt granskingargrundaða vitan um dysleksi til ítøkiligt undirvísingarvirksemi

- Vit eiga at  gera ein góðan leist  fyri samstarv millum lærarar, lesivegleiðarar og serlærarar at arbeiða eftir, tá ið talan er um fólk við dysleksi
- Vit eiga at raðfesta vitan um lesitrupulleikar í læraraútbúgvingini
- Vit eiga at raðfesta sernámsfrøðiligan stuðul, ráðgeving og vegleiðing av ungum og vaksnum við dysleski í útbúgvingarskipanini
- Vit eiga at leggja dent á týdningin av, at skúlin klárar at fáa fólk við dysleksi at trívast í skúlanum og hjálpa teimum at menna seg í skúlagongd teirra
- Vit eiga at vegleiða um eftirskúlar fyri fólk við dysleksi
- Vit eiga at ráðgeva teimum, sum vara av fólki við dysleksi
- Vit eiga at lætta fólki við dysleksi vegin frá fólkaskúlanum til vinnuútbúgvingar ella aðrar útbúgvingar
- Vit eiga at  hyggja at lesitrupulleikum og lívstrupulleikum. Hvussu ávirkar dysleksi sálarligu heilsuna?
- Vit eiga at hyggja at, hvussu tað er at vaksa upp við dysleksi. Hvørjar kognitivar, kensluligar og sosialar avleiðingar fær hetta?
- Vit eiga at hugsa um kognitivu avleiðingarnar av drúgvum lesiroyndum: tú gerst klókari av at lesa nógv (Matheus ávirkanin). Hvat so um ein ikki hevur lært at lisið?

Hóast vit í dag vita nógv um dysleksi, er langt eftir á mál hjá okkum í Føroyum, tá ið um ræður munadygg  tilboð  til fólk við dysleksi. Tað, at dysleksi og t.d. ADHD í summum førum vera mett at fella saman, ger ikki støðuna og harvið møguleikarnar at hjálpa einfaldari.  Stórsta týdning hevur tað tó, at avvarandi myndugleikar taka støðuna í álvara og hava sett skjøtil á at breiða vitan út um bæði vanligu lesimenningina og trupulleikarnar, sum kunnu vera eisini. Um hesi tiltøk skulu gera ætlaða munin, má syrgt verða fyri, at tey, ið nú nema sær vitan, fáa væl skipaðar umstøður at arbeiða undir, tá ið tey koma út á skúlarnar at arbeiða.

Berast má so í bandi, at børn og ung verða greinað á so góðan hátt, at til ber so skjótt sum møguligt at siga júst, hvat bagir. Í teimum førum har vit áttu at havt barna-, ungdómspsykiatara við í tilgongdini, hevur hetta ofta verið ein tung tilgongd, tí vit hava verið noydd at dúva uppá útlendska arbeiðsmegi. Sum sagt í byrjanini er skjót hjálp góð hjálp, og so vildi sjálvsagt eisini verið í tílíkum føri.

Mín vón er tí, at vit ikki liggja sjóvarfallið av okkum, tá ið um ræður børn okkara,  gentur sum dreingir.